# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
POST@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Fíggjarlógararbeiði

Í hesum døgum verður uppskot til fíggjarlóg viðgjørt í landsstýrinum. Teir ymsu landssstýrismenninir leggja síni ynski fram og verða hesi so vend og vigað av øllum landsstýrinum men serstakliga av landsstýrismanninum í fíggjarmálum, sum hevur endaligu ábyrgdina av fíggjarlógini. Eftir hetta skal so endaliga uppskotið til viðgerðar á tingi og eftir tað skal hon so ígjøgnum oftani smáu meskarnar í fíggjarnevndini, sum hesi bæði fyrstu samgonguárini hevur víst seg at hava eina støðu, sum ikki nýtist at samsvara við hana hjá landsstýrinum.

Eingin ivi er um, at tað verður ein torfør uppgáva eisini hesaferð at fáa hesa kabalu at ganga upp. Soleiðis vil tað altíð vera, har talan er um ymiskar flokkar við ymiskum raðfestingum.

Enn hava vit ikki hoyrt nógv um fíggjarlógaruppskotið annað enn, at fíggjarmálaráðharrin hevur meldað út, at tað skal vera yvirskot á fíggjarlógini hesaferð. Hvat hetta fer at merkja er ilt at meta um, men tað kundi borið á, at tað hevur gingið væl betri at fáa inntøkur í landskassan í hesum árinum, enn tað varð mett, tá henda fíggjarlóg varð sett út í kortið. Tá varð kalkulerað við einum undirskoti uppá meira enn 200 mill. kr.

Talan er her um eina rættiliga týðandi fíggjarlóg, tí hon er at meta sum tann fíggjarlógin, sum fer at merkja komandi løgtingsval. Spurningurin er tí, um fíggjarmálaráðharrin fer at geva einstøku landsstýrismonnunum langar teymar, soleiðis at teir við at seta nóg nógvar pengar av til mongu greinarnar, harvið eisini fáa betri møguleika at fara til eitt val uppá. Hugsast kann eisini, at fíggjarmálaráðharrin fer at stramma í og heldur vil hava eitt yvirskot á fíggjarlógini, sum hann so kann brúka í einum komandi valstríði.

Hetta landsstýrið hevur lovað nógv og verður nú strammað í fyri at fíggjarlógin skal geva yvirskot, so er hugsandi, at mongu lyftini ikki fara at verða hildin. Stór mál eru, sum samgongan segði hon skuldi loysa, og tað eru hesi, sum bæði andstøða og almenningurin fara at hava eitt vakið eygað við, eitt nú lyftini um at fremja ábøtur á eldraøkinum herímillum spurningurin um pensiónirnar. Hetta er kanska størsta einstaka málið, sum henda samgongan kann vinna ella tapa uppá.

Tað hevði eisini verið bæði rætt og gott, um andstøðan longu í hesi fasuni kom við ítøkiligum og realistiskum útmeldingum um, hvussu hon metir, at ein fíggjarlóg fyri 2007 eigur at síggja út sæð út frá dagsins veruleika tvs. veruligu búskaparligu støðuni í samfelagnum í løtuni og eisini grundað á útlitini fyri 2007.

**Sosialurin**

## Rúsdrekkanýtslan í Føroyum

SIGVALD KRISTIANSEN



### Nakrir tankar í samband við skriving um rúsdrekkanýtslu

Nú tað er staðfest, at nýtslan av rúsdrekka økist í Føroyum, er væl skiljandi, at formaðurin í fyribyrgingarráðnum ger vart við støðuna. Rúsdrekka verður nýtt, tað kunnu vit ikki koma uttanum, men endamálið hjá fyribyrgingarráðnum er at tálma nýtsluni, og tað kunnu vit vist øll taka undir við, tí ovurnýtsla av rúsdrekka hevur so nógvar keðiligar avleiðingar við sær, bæði menniskjansligar og samfelagsligar, bæði fyri tann einkulta og fyri heildina. Hetta verður gjørt á ymiskan hátt á lóggávuøkinum við avmarkaðum útsølustøðum og tollavgjøldum, og alment við upplýsing um trupulleikar, sum ein ovurnýtsla av rúsdrekka kann føra við sær.

Rúsdrekkalóggávan kann av nógvum tykjast sum skerjan av tí persónliga frælsinum, sum vit leggja so stóran dent á og meta so høgt, og kostnaðurin av rúsdrekka kann tykjast ov høgur hjá teimum, sum fegin vilja njóta rúsdrekka við máta.

Her kemur so spurningurin upp, um eg hugsi meira um meg sjálvan og míni viðurskifti og minni um míni medmenniskju, heildina, samfelagið. Um eg eri egoistiskur ella solidariskur.

Tá vit hoyra um avleiðingar av rúsdrekkaávum frá Kvinnuhúsinum ella úr ferðsluni ella frá viðgerðarstovnum, so taka vit synd í teimum, sum tað gongur út yvir. Hvat kunnu vit gera í slíkum førum? Einki? Tøkk skulu tey hava, sum veita eina hjálpandi hond.

Vit vilja so fegin samanbera okkum við donsk viðurskifti, sum verða brúkt sum argument fyri, hvussu tað skuldi verið hjá okkum, eisini á hesum økinum.

Í Ugeskrift for Læger, sum kom nú í vikuni, skrivar yvirlæknin Jacob Ulrichsen frá Psykiatrisk Center, Amtssygehuset í Gentofte, grein um viðgerð av alkoholmisnýtslu og sigur millum annað:

Få lande er - om nogle - så hårdt ramt af alkoholmisbrug som Danmark, idet vores store alkoholindtag skønnes at koste samfundet 10 mia. kr. om året.

Her er bert nevnt, hvat rúsdrekkamisnýtslan kostar tí danska samfelagnum í peningi um árið í dag. Koma vit uppá somu nýtslu av rúsdrekka, sum í dag er í Danmark, kemur hetta at kosta okkum 100.000.000 kr. um árið, tá tosa vit bara um peningaligan kostna. Vilja vit verunliga koma at líkjast Danmark á hesum økinum? Hetta er ein spurningur, sum samfelagið má taka støðu til, og sum tann einstaki eisini má hugsa gjølla um.

Ofta verður í slíkum kjaki dentur lagdur á at upplýsa um vandan við misnýtslu. Meira upplýsing tykist vera loysnarorðið. Eg ivist ikki í, at danskarar eru væl upplýstir og vita alt um skaðar, sum rúsdrekkamisnýtsla førir við sær. Kortini er nýtslan av rúsdrekka økt so nógv, at tað hevur stórar samfelagsligar fylgjur, sí sitatið omanfyri. Vit eru ikki minni upplýst á hesum økinum, so tað er ein spurningur, um tað er nóg mikið við upplýsing. Nógv í Danmark kemur til okkara eftir nøkrum árum. Vónandi verður tað ikki so á hesum økinum.

Tað er fyrimunur í at fyribyrging enn at viðgera.

## Vandamikið rák

SÚSANNA DAM



Landsins bestu heilar, ella eg helt, at sjálvandi verða landsins bjartastu skilvit og best útbúnu fólk kosin til at gera okkum eina nýggja stýriskipan, grundlóg, ella hvat barnið nú einaferð fer at eita. Men tíðindi hesa seinastu tíðina hava sáað ein ógvuliga stóran iva um hetta veruliga er so. Nú fræTtist at í hesi nýggju stýriskipan er fólkaræðið umbýtt við kristin virði. Hvørji eru tey kristnu virðini. Hvør er førur fyri at lýsa munin millum kristin virði og reinan fanansskap. Hugtakið demokrati ella fólkaræði er so við og við vorðin rættiligur substansur. Vit vita hvat tað er, og vit vita eisini hvussu tað virkar. Tað bæði sæst og kennist um tað er tilstaðar ella ikki.

Kristin virði hava altíð og fara altíð at festa eld í krúttunnur, tí tey kunnu ikki definerast á skilagóðan hátt, men eru persónliga sannføringin hjá hvørjum einstøkum. Mær tykir eisini ræðandi at ímynda mær, at onkur av hesum heimi nú skal døma og sekta brot á lóg um kristin virði. Hava íspinnararnir til hesa ørvitisreglu ikki tíð at bíða til rætta tíðin kemur fyri hvønn av okkum?

Føroyingar hava fólkaræði, meir og minni, alt eftir hvussu illa teir ræðast grannan, arbeiðsgevaran og hin altíð fúsa "bróðurringin" sum av øllum alvi roynir at terrorisera okkum við sínum kristnu virðum. Men so er tað so heppið at fólkaræðið og talufrælsið enn loyva mær at mótmæla og greiða "bróðurringinum" frá at míni kristnu virði eru júst øvugt av tí, teir lesa og fyriskriva.

Fólkaræði er trúarfrælsi. Ódefineraði kristin virði avtaka bæði trúarfrælsi og fólkaræði.

Mest av øllum tyktust tíðindini hendan dagin, sum ein "joke" - men ikki petti stuttligur - at farið verður aftur í kolasvørtu miðøldina at leita eftir fyridømi til okkara nýggju stýrisskipan.

Eru tíðindini hinvegin sonn, so eru fólk farin fullkomiliga frá viti og skili, hava misskilt uppgávuna og mugu setast frá arbeiðinum við brestin, tað er alt ov vandamikið at lata tey halda fram.

**Sosialurin** **Sosialurin**
Stovnaður: 1927

**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo
Birgir Waag Høgnesen birgir@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo
Rólant Waag Dam rolant@sosialurin.fo
Heini Kristiansen heinik@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.